## Tøkk

Hjartans tøkk til øll, sum sýndu samkenslu og hjálpsemi tá ið okkara kæri maður, pápi, abbi og verpápi

**Ólavur Jacobsen**
Sumba

andaðist og varð jarðaður.
Tøkk fyri heilsanir, uppringingar, blómur, kransar og peningagávur.
Tøkk til Patrick de Neergaard fyri troystarrík orð í kapellinum og í kirkjuni. Tøkk til sangarar, berarar, kirkjutænarar og gravarar.
Eina hjartans tøkk til tykkum á Suðuroyar Sjúkrahúsið, fyri tað stóru hjálp, ið tit á ymiskan hátt veitti okkum. Gud vælsigni tykkum fyri tað.
Eisini eina hjartans tøkk fyri tað stóru hjálp, sum bleiv veitt okkum, í samband við jarðarferðina og ervið.
Tøkk til øll, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Osvør**
**Poul Erik, Anna Elisabeth, Tummas,**
**Niels Petur og Sólja**
**Tórður, Maria, John, Barbara, Rani,**
**Ólavur og Emilia**
**Annika**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit tykkum øllum fyri sýnda samkenslu, tá okkara elskaða kona, mamma, vermamma, omma, langomma og olduromma

**Emma Joensen**
Vágur

andaðist og varð jarðað.
Ein serlig tøkk til tykkum á Eldrasambýlinum, sum vóru so góð við hana ta tíðina hon búði har.
Takk til prest fyri troystarrík orð á Eldrasambýlinum og í kirkjuni.
Takk til kirkjutænarar, sangarar og gravarar.
Takk fyri blómur, kransar og gávu til Eldrasambýlið.
Og takk øll tit, sum hjálptu til við ervinum.
Takk til tykkum øll, sum fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.
gud vælsigni tykkum øll.

*Fyri tey avvarðandi*
**Elias**
**Jonna, Jógvan, Marjun, Pauli og Erla**






# Kristian Meitil listaframsýning

Beint fyri hvítusunnu, fríggjadagin 29. mai, letur framsýning upp í Smiðjuni í Lítluvík við verkum av Kristiani Meitil. Talan er um eina retrospektiva/afturlítandi framsýning við standmyndum.

Kristian Meitil er føddur í 1931 í Klaksvík og vaks upp á Vágsheygi sum yngstur av 10. Foreldrini vóru Jacob Frederik og Katrina Mikkelsen.

Hann hevur arbeitt sum konservator á Náttúrugripasavninum, har tey vitjandi kunnu gleðast yvir ta føstu framsýningina av sjódýrum, serliga fiskum og hvalum, sum hann hevur gjørt.

Nógv kenna eisini Kristian fyri hansara musikalsku evnir. Trombonin plagdi at vera hansara instrument í hornorkestur- og jazz-høpi. Seinnu árini er tað serliga harmonikan sum verið frammi, t.d. í Harmonikuliðinum.

Kristian hevur altíð tikist við list: tekningar, málningar, leir og grafikk. Sjáldsama væl hevur hann dugað at fá tað til at líkjast. Á framsýningini í Smiðjuni í Lítluvík verða sýndar standmyndir, m.a. av familju og skyldfólki.

Framsýningin, sum letur upp fríggjadagin 29. mai, varar til og við týsdagin 2. juni. Opið verður allar dagar frá klokkan 14 til 18. Leygardagin verður tó leingi opið: frá 10 til 18.



*Framsýningin hjá Kristiani Meitil í Smiðjuni í Lítluvík letur upp fríggjadagin 29. mai*


**Eysturkommuna**

## Dagrøktarar til Eysturkommunu

Søkt verður eftir dagrøktarum til dagrøktarskipanina í Eysturkommunu. Í dagrøktarskipanini eru børn í aldrinum 0 til 3 ár. Ein dag um vikuna ella meir arbeiða dagrøktarnir saman í spælistovuni sum er knýtt at dagrøktarskipanini.

Vit ynskja at tú sum dagrøktarmamma tekur støði í tí einstaka barninum, ert nærløgd og vísir góð samstarvsevnir bæði við foreldur og starvsfelagar

**Lønar- og setanartreytir**
Starvið verður lønt sambært avtalu millum Føroya Arbeiðarafelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið

**Umsóknir**
Umsóknir við avriti av prógvi og møguligum viðmælum skulu vera Eysturkommunu, Postboks 30, 510 Gøta, í hendi í seinasta lagi hósdagin 28. mai 2009.

**Nærri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Elin Mikkelsen, leiðara á telefon 73 00 55.



**Eysturkommuna**

## Námsfrøðingar og hjálparfólk til nýggja dagstovnin í Leirvík

Í samband við at nýggi og stásiligi dagstovnurin í Leirvík verður tikin í brúk, verður søkt eftir námsfrøðingum og hjálparfólkum. Størvini eru frá 25 – 40 t. um vikuna. Um námsfrøðingar ikki søkja, verður annað fólk sett ístaðin.

Vit ynskja eitt starvsfólkatoymi, ið er til reiðar at taka ábyrgd av at uppbyggja ein stovn, ið er sjónligur, bæði í orðum og gerðum. Toymið byggir á:

**SAMSTARV, SAMSKIFTIÐ, ÁLIT OG ÁBYRGD**

Tú skalt somuleiðis »brenna« fyri eini námsfrøði, ið tekur støði í:

**SPÆLI, RØRSLUM, SANGI OG TÓNLEIKI**

**Lønar- og setanartreytir**
Starvið verður lønt sambært avtalu millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðagevarafelagið

**Umsóknir**
Umsóknir við avriti av prógvi og møguligum viðmælum skulu vera Eysturkommunu, Postboks 30, 510 Gøta í hendi í seinasta lagi hósdagin 28 mai 2009.

**Nærri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Sigvør Gregersen, stovnsleiðara á telefon 73 00 41, ella við at vitja heimasíðuna: www.123hjemmeside.dk/barnagard.